# Gallup-kanning: Sera uppdeilt arbeiðsbýti

Javnstøða: Arbeiðsbýtið í føroyska húsarhaldinum er rættiliga uppbýtt. Tað eru framvegis uppgávur, sum eru kvinnu- ella mannfólkaøkir burturav. Hetta vísir kanning, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Javnstøðunevndina. Tíverri ber ikki til at sammeta, hvussu støðan var fyri 5, 10, 20 árum síðani, tí hetta er fyrsta kanningin av sínum slagi í Føroyum.

Fyri fyrstu ferð er kannað, hvussu arbeiðsbýtið er í teimum føroysku húsarhaldunum. Tað er Javnstøðunevndin, sum hevur fingið hetta í lag saman við Gallup Føroyar.

Sum úrslitini vísa, so er arbeiðsbýtið í heiminum rættiliga kynsuppbýtt – eitt nú hevur kvinnan høvuðsábyrgd av reingerð, at vaska klæði og at strúka, meðan maðurin hevur høvuðsábyrgdina av at halda kjallaran, vaska bil og at taka sær av umvælingum fyri at nevna nøkur dømi. Úrslitini eru meir útgreinað aðrastaðni.

Tað áhugaverda er, at tað nú er grundarlag fyri eitt nú at hyggja at, hvør ger hvat í húsarhaldinum, og at sammeta hetta arbeiðsbýtið við løntu arbeiðstíðina hjá bæði kvinnuni og manninum. Tað ber eisini til at hyggja at landafrøðiligum munum, hvussu ymiskt ættarliðini býta arbeiðið millum sín ella um útbúgvingarstig hevur týdning fyri húsarhaldsarbeiðið, fyri at nevna nøkur øki.

**Ongar søguligar samanberingar**

Hevur tað havt týdning fyri arbeiðið í húsarhaldinum, at kvinnan hevur trinið út á arbeiðsmarknaðin?

Tíverri ber ikki til at sammeta, hvussu støðan var fyri 5, 10, 20 ella 30 árum síðani, tí hetta er fyrsta kanningin av sínum slagi í Føroyum.

Sjálvandi ber til at gita, hvussu støðan hevur verið, og at samfelagið er á veg til eitt javnari arbeiðsbýti í húsarhaldinum.

Eitt nú benda hagtølini í fleiri spurningum á, at tað er munur á, hvussu virkin ættarliðini eru í teimum ymisku økjunum, so sum at reingera, gera mat og keypa inn.

Hjá teimum yngru vísir arbeiðið at verða nakað javnari býtt, men tað er framvegis kvinnan, sum hevur høvuðsábyrgdina av klæðunum, reingerð og mati meðan menn fletta, vaska kjallara og gera ábøtur á húsini.

Eisini er munur á, hvussu arbeiðsbýtið er, alt eftir hvar í landinum búleikast verður. Suðurstreymur og Norðstreymoy vísa seg í flestu førum at hava javnari arbeiðsbýti millum kynini enn hini økini, kortini er arbeiðsbýtið sera uppbýtt har eisini.

**Gongdin**

Ein slík kanning er áhugaverd og átti í grundini lagt síðani at verið gjørd, tí at síggja til er leikluturin hjá kynunum báðum so ómetaliga nógv broyttur seinastu árini.

Frá at vera einsamalli forsyrgjarin stendur ein maður í dag sjáldan fyri allari inntøkuni í einum húsarhaldi og noyðist ikki í sama mun at skaffa húskinum føði frá sjógvi og landi.

Leikluturin hjá kvinnuni í dag og fyri 20, 30 – 40 árum síðani í Føroyum er eisini víðkaður almikið – kvinnan tekur slettis ikki í sama mun einans útgangsstøði frá húsarhaldinum.

Hennara leiklutur var einaferð at gera mat, ansa børnunum, hava umsorgan fyri teimum gomlu og seyma og vaska klæðir fyri at nevna nakrar av uppgávunum.

Síðani er kvinnan farin á arbeiðsmarknaðin. Hetta má ávirka hvussu fólk húsast. Tað eru eisini risa tøknifrøðilig framstig gjørd hesi seinastu fimti árini soleiðis at húsarhaldsuppgávur ikki taka eins nógva tíð í dag, sum tær einaferð hava gjørt. Hinvegin, so skal uppvaskimaskinan framvegis fyllast og tømast, vesini vaskast, og klæðini skiljast, vaskast og turkast.

**Sama møguleika**
Tað eru ikki gjørdar kanningar av, hvussu stóran part av samlaðu inntøkuni í einum húsarhaldi, ið kvinnan og maðurin hava, men sum tølini vísa, so er arbeiðstíðin styttri hjá kvinnum enn monnum.

Tað eru hópurin av niðurstøðum, sum kunnu gerast út frá hesi kanning. Kanningin kann vera grundarlag undir einum kjaki um, hví arbeiðsbýtið er sum tað er?

Javnstøða snýr seg um veruligar møguleikar hjá bæði kynunum at luttaka bæði í húsarhaldinum, í arbeiðslívinum og almenna rúminum.

Við øðrum orðum er tað ikki nóg mikið um kvinnur á pappírinum t.d. hava sama møguleikar at arbeiða, um tær ongan møguleika hava at fara úr heiminum.

Tað hjálpir heldur ikki, um maðurin hevur hug at gera ymiskt í húsarhaldinum um kvinnan ikki loyvir tí, ella ger tað umaftur, sum hann júst hevur gjørt.

Ætlanin er avgjørt ikki, at tølini skulu verða nýtt at buka nakran í høvdið við, men at fáa nakrar staðfestingar soleiðis at sleppast kann undan gitingum og kanska illgitingum og mýtum um, hvør ger hvat í húsarhaldinum. Hetta er ein støðulýsing av javnstøðuni í húsarhaldinum.

Fyri politikarar og onnur er alneyðugt við nógvum datatilfari, tá lógir skulu smíðast, men sjálvandi er eingin sum skal lóggeva um, hvat hvør skal gera í húsarhaldinum.

Henda kanningin kann verða íblástur fyri at gera meir kvalitativa gransking á økinum um arbeiðsbýti, løn, vinnumøguleikar o.a. hjá kynunum báðum og hvussu til stendur viðvíkjandi javnstøðu. Tílík gransking kann gerast grundarlag undir lógarsmíði og herferðum hjá landsstýrinum, kommunum og øðrum stovnum og privatum fyritøkum.

**Gongdin**
Tað verður spennandi at síggja, hvussu gongdin verður í júst hesum málinum, og hvussu arbeiðsbýtið verður um eini 5, 10, 20 ár.

Samfelagsgongdin annars bendir íð hvussu er á, at tað eru bæði kynini sum mugu verða á arbeiðsmarknaðinum fyri at kunna upprætthalda ein rímiligan livifót – ikki tí kynini hava verið á arbeiðsmarknaðinum eina tíð nú, tí er áhugavert at vita, um tað fer at broyta munandi um, hvat hvør ger í húsarhaldinum. Verður tað eitt javnari arbeiðsbýti innanveggja? Um so er, hevur tað týdning fyri at fáa eitt nú fleiri kvinnur í hægri og betur lønt størv?

Tað er eisini so nógv viðurskifti, sum kunnu fáa árin á, hvussu arbeiðsbýtið framyvir verður í húsarhaldinum, eitt nú ein komandi barsilsskipan og árinið á henni á føroyska arbeiðsmarknaðin sum heild.

Sum er, vísa hagtøl, at menn forvinna meir enn kvinnan á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men tað eur higartil ikki gjørdar útgreiningar av, hví so er, og hvussu stórur lønarmunurin er vegna kynið.

Í Norðurlondunum er kynslønarmunurin millum 4 – 13%.

Fakta:

Gallupkanning gjørd 23. november til 1. desember 2004 fyri Javnstøðunevndina. Endamálið við kanningini var at kanna javnstøðu í føroysku heimunum. 498 fólk, ið eru úr húsarhaldum við meir enn 1 persóni hava svarað øllum spurningunum. 20,5 % av teimum spurdu bóru seg undan at luttaka, og hetta er meir enn tað vanligt. Svørini verða m.a. býtt upp í kyn, aldursbólkar og størv.